VIÐMERKINGAR

# Nú stendur tað upp til okkum sjálvar

**Bjørn Patursson,**
*formaður*
*Bóndafelag Føroya*



Eg fari við hesum at leggja stríðið, um at fáa regluna um innflutning av livandi dýrum, úr veterineravtaluni við ES.

Nógv hevur verið roynt og nógv hevur verið tosa. Tann seinasta royndin var nú her fyri tá so frægir menn sum løgmaður, varaløgmaður og sjálvur landbúnaðarmálaráðharrin gjørdu eina seinastu roynd, at rætta uppá hetta mistak. Tó ikki óvænta, fingu teir greitt svar frá millumnevndini, at skal naka gerast nú fellur øll avtalan á gólvið. "Take it or leave it", síkt er stórmakta-samstarv! Nú stendur tað so upp til okkum sum hava við landbúnað og dýrahald at gera, at vit ansa okkum.

**Hvat er at gera**

Eingin fær meg at siga, at vit skulu gera sum Amish fólkini, halda okkum uttan fyri alt. Tað er skilagott at fornýggja seg, tað vita vit sum hava við dýrahald at gera og vita eitt sindur um nøring. Men hinvegin, vit skulu ikki gloyma, at tað sum er bygt upp hevur tikið langa tíð og neyðugt er at hugsa seg væl um hvat gjørt verður.

Vit hava Almennar Royndir og Ráðgeving, sum hevur um hendir alla landbúnaðarráðgeving og alt royndar-virksemið. Somuleiðis hava teir um hendir ísáðing og neytaeftirlit. Endamálið við hesum virksemið má verða at finna nýggjar leiðir og ganga á odda tá brótast skal upp úr nýggjum. Vit eiga at gera nýtslu av hesum møguleika og brúka hesa støð til royndir og verju.

Vit hava eitt fakfelag sum nú er við at fáa fótin fyri seg. Vónandi kemur tað at gera munin í framtíðini bæði tá tað snýr seg um at ráðgeving og at halda eygu og oyru opin fyri tí sum hendir rundan um vinnuna.

MBM er seriøsur felagskapur og sjálvt um Djóralæknatænastan er privat virksemið, eri eg onga løtu í iva um at søkjur ein sær ráð eru nógvar hurðar opnar. Jarðarráðið hevur eisini landbúnaðarfrøðingar ansettar.

Føroyska landsdjóralækna-embætið átti, eftir mínum tykki, ikki bara at hugsa um sjúkur

Landsdjóralæknin hevur evsta vald á sínum øki. Tað er ikki smávegis ábyrgd at sita við. Man tað verða annaleiðis at sita sum landsdjóralækni í Føroyum enn t.d. í Noregi? Helst ikki siga nógv, og hví skulu føroyingar altíð skjóta seg inn undir at vit eru annaleiðis?

Men her haldi eg tó at støðan hjá okkara landsdjóralækan er annaleiðis. Hann er munandi meir sjónligur og hevur eitt munandi meir avmarka øki at umsita. Hetta lítla øki hevur sjógv í allar ættir, umframt at hetta land aftur er samansett av 18 oyggjum.

Vit eru ein serstøk tjóð við okkara egnu siðum. Okkara seyðahald verður ikki rikið eins og vit kenna tað í ES. Sjálvt íslendingar, grønlendingar og norðmenn kunnu ikki reka sítt seyðahald eins og vit gera. Hvør háttur er skilabestur skal eg ikki koma inn uppá á hesum sinni, men vil bert vísa á, at vit eins og við grindini víkja frá á hesum øki, og tað eiga okkara myndugleikar at verða greiðir yvir og virða. Tað kann ikki gera skaða at samstarva.

Seyðahald, og stórt sæð allur landbúnaður, byggjur á "sjálvrekrut-terðandi" skipanir. Vit hava okkara egna føroyska seyð, sum hevur tillaga seg okkara veðurlag og viðurskiftir. Hartil byggir seyðahaldið á aldar gamlar siðir, sum bæði seyðurin og vit sum fáast við, royna at halda fast um. Slagið og røktingarhátturin byggir á lágt kostnaðarstøði og nettoúrtøku. Tað eru fleiri enn ein sum halda, at tað illa ber til at fáa nógv meir burtur úr seyðinum enn vit í dag fáa burtur úr einum skilagóðum rakstri, also "netto"!

Men tað er væl skiljandi at fólk vilja royna naka nýtt. Nærliggjandi er at hugsa sær at fólk sum hava avmarkaða økið t.d. eina trøð, vilja royna nýtt seyðaslag. Men hvussu nógvar hagar mann ein græður brundseyður náa at fara um tá óhappi hendur og hann brýtur seg út av eini trøð t.d. í Havnardali áðrenn hann verður afturfunnin?

**Lat hetta verða ein lærupenga**

Tað er við ringum tannabiti, men vit kunnu siga at vinnan hevur við hesum lært, at tað er alneyðugt at verða árvakin og halda eygu og oyru opin fyri hvat fyriferst uttan um okkum. Hetta gerst best við at standa saman sum ein maður og krevja sín rætt.

Bóndafelagið hevur eftir mínum tykki gjørt tað sum gerðast kann í hesum máli. Vit hava gjørt tað sum stendur í okkara makt til tess at redda barnið uppaftur á turt. Uppskot hava verið fleiri bæði frá einstøkum limum og fólki annars, tøkk fái tit fyri tað. Eg haldi, at vit øll, -bæði føroya fólk og okkara politikarar vita hvat er fyrifarist í hesum máli og hvør støðan er. Um ikki annað so lat okkum taka við læru av tí sum hent er.

**Nú er ikki at sita hendur í favn**

Nú eiga vit, og fyrst og fremst okkara myndugleikar, sum hava komið okkum í hesa støðu, at bróta upp um armar og seta allar kreftir á til tess at byggja fyribyrgjandi tiltøk og verja okkum best møguligt. Neyðug tiltøk til tess at staðfesta okkara dýraheilsustøðu mugu setast í gong alt fyri eitt. Vit hava til dømis eitt væl virkandi sláturvirkið í Hósvík sum longu hevur uppbygt djóralækaneftirlit við øllum dýrum sum verða flett har. Tey verða kannaði bæði á lívið og eftir fetting. Bæði har og hjá virkandi Djóralæknatænastuni eiga at finnast virðismiklar upplýsingar sum, eftir mínum tykki, longu nú kunnu brúkast í verjutiltøkum.

**Heldur eingin skiftistíð í hesum sambandi**

Tað er bara óskiljandi og ein beiskur bitið at svølgja hetta, at vit ikki kundu fáa eina tillagingartíð til tess at fyrireika okkum til hesa kolveltandi støðu. Men soleiðis uppføra stórmaktir seg í samráðingum anno 2000. Lat okkum skriva okkum hetta aftan fyri oyra. Góða heilsu.

# Gongdin í samráðingunum

**Karsten Hansen**
*landsstýrismaður*



Starvsmannafelagið førir fram, at ongar veruligar samráðingar hava verið millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og at Fíggjarmálastýrið ongantíð er komið við nøkrum útspæli ella aftursvari. Hetta er ikki rætt. Tað hava verið seks samráðingarfundir. Fíggjarmálastýrið hevur lagt fimm uppskot um loysn fyri felagið, sum tó allar eru avvístar.

Gongdin í samráðingunum hevur annars verið henda:

18. oktober 2000 var fyrsti fundur. Krøvini hjá Starvsmannafelagnum vóru grundleggjandi broytingar í sáttmálanum. Fastir frídagar skulu vera teir somu sum hja øllum øðrum, úrtíðarlønin skal vera 50% og 100%, dekkarin skal flytast 6 flokkar upp, bátsmaðurin 7 flokkar og kokkurin 6 flokkar. Í fyrsta umfari skuldi tað vera leyst av tí, hini feløgini gera, men kortini vildi felagið treyta sær, at teir ikki detta niður ímillum.

Fíggjarmálastýrið førdi fram, at dekkarar hava altíð fingið somu løn, sama ger hvørjum skipi teir hava verið við.

Avtalað varð, at SF skuldi staðfesta munin millum arbeiðið hjá dekkarunum á Brimli samanborið við aðrar dekkarar.

20. oktober 2000 var annar fundur. Onkur misskiljin hevði verið. SF hevði ikki uppfatað tað sum at teir skuldu venda aftur. Teir staðfestu kortini, at til bar ikki at vísa á beinleiðis broytingar. Teir nevndu tó, at arbeiðsuppgávan verður fjølbroyttari — m.a. størri radius og vandi fyri oljuvanlukkum.

1. november 2000 var triði fundur. Fíggjarmálastýrið førdi fram, at broyting er fyri maskinstjóran. Har eru størri krøv. Fer maskinstjórin upp, má skiparin eisini fara upp. Tað kann kanska verða ført yvir á bátsmannin. Hann skal eisini hava ein dekkara meiri undir sær. Allir dekkarar eru í dag løntir líka — er dekkarin t.d. á Smyrli ella á Rituni, hevur tað ikki ávirkan á lønina.

Felagið varð spurt, um teir vildu samráðast saman við hinum. Tað kundu teir ikki svarað uppá tá. Teir vildu eisini treyta sær, at úrslitið hongur saman við tí, yvirmenninir fáa.

24. november 2000 var fjórði fundur. Hann var við formenninar í øllum feløgunum, men tað kom ikki nærri nakrari loysn.

27. november 2000 var fimti fundur. Hann var bara við Starvsmannafelagið. Felagnum varð gjørt greitt, at krøvini hjá teimum vóru nøkur og 30%. Lønarhækkingin er millum 8 og 10%, frídagarnir eini 10% og úrtíðin eini 15%. Fíggjarmálastýrið førdi fram, at dekkararnir á Brimli skulu verða flokkaðir sum teir á Tjaldrinum – eingin broyting. Bátsmaðurin kann koma uppá tal, tí har er ávís leiðsla í. Hini krøvini vórðu avvíst – tey verða ikki viðgjørd bara fyri Brimil.

Fíggjarmálastýrið spurdi, um støðan ikki var, at til bar ikki at koma víðari. Tað helt Starvsmannafelagið ikki. Teir mugu vita, hvat avtalurnar við yvirmenninar geva, tí samband má vera millum avtalurnar.

2. desember 2000 var sætti fundur við Starvsmannafelagið. Fíggjarmálastýrið kom við uppleggið um at seta manningarnar sum tænastumenn. Starvsmannafelagið segði nei.

16. januar 2001 sendi Fíggjarmálastýrið Starvsmannafelagnum uppskot um at seta starvsmetingarnevnd í sambandi við Brimil. Starvsmannafelagið vísti uppskotinum aftur í skrivi dagfest 17. januar 2001.

19. januar 2001 sendi Fíggjarmálastýrið felagnum uppskot um at velja semingsmann. Í skrivi dagfest 22. januar 2001 boðaði felagið frá, at tað góðtók ikki, at semingsmaður kom inn í myndina.

31. januar 2001 heitti Fíggjarmálastýrið á Starvsmannafelagið at Brimil verður avgreiddur í sambandi við vanligu sáttmálasamráðingarnar. Tað ber í sær, at eingin konflikt verður um Brimil fyri 1. mars.

31. januar 2001 svaraði Starvsmannafelagið, at málið skal verða avgreitt serskilt og kann als ikki verða blandað saman við og verða tikið upp undir vanligu samráðingunum. Tað skal verða loyst fyrst. Teir hava als ikki hug at svara spurninginum um at eingin konflikt verður um Brimil fyri 1. mars 2001.

Eg harmist um, at neyðugt er at leggja uppskot fyri Løgtingið um sáttmálar fyri Brimil, men sum tað sæst av tí, sum stendur omanfyri, sær tað tíverri ikki út til at ber til at røkka eini samráðingarloysn.

Málið hevur skund, tí øll eftirlitstænastan og sjóbjargingin stendur upp á spæl, nú vártíðin nærkast, og aktiviteturin er vaksandi, samstundis sum nógv útlendsk skip nú eru byrjað at fiska aftur í føroyskum sjógvi sambært galdandi fiskiveiðiavtalum fyri 2001. Haraftrat kemur tilbúgvingin á sjónum, sum er ógvuliga skerd, nú Brimil liggur. Skuldi ein oljuvanlukka hent, hevði hetta havt álvarsamar avleiðingar fyri alt landið, nú tilbúgvingin er á so lágum støði sum nú. Tí er altavgerandi, at V&B fæst at virka optimalt aftur nú.







## Søkt verður eftir

einum fólki til handil okkara í Havn fulla tíð.

Arbeiðið verður fjølbroytt og kemur at fevna um kundarøkt, prísáseting, dekorera og annað.

Vit seta eingi ávís førleikakrøv. Tó hava umsøkjarar við royndum innan handil og dekorering fyrimun.

Vit leggja dent á, at tú ert álítandi, hevur arbeiðsevni og dámar væl at umgangast nógv fólk.

Vinarliga sendið skrivliga umsókn til:

Thomas Dam búnýti
Niels Finsensgøta 18 · Box 1094 · FO-110 Tórshavn
Tlf. 314930 · Fax 314933

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## Innbjóðing

Leygardagin 10. februar kl. 15.00
verður framløga av bókini

»Villvísi«
**Yrkingar**: Tóroddur Poulsen
**Steinprent**: Bjarn W. Sørensen

***Øll eru vælkomin***
***í Grafiska Verkstaðin***
Inngongd í norðara enda í gamla Listaskálanum

*Vinarliga*
**Grafiski Verkstaður Føroya**

## Hús til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru eini eldri sethús á Hvítanesi til sølu.

**Tlf. 318009**

## Útbjóðing

Vegna Tórshavnar havn verður biðið um tilboð uppá at taka ímóti gróti frá tunnilsgerðini um Vestmannasund og leggja tað út á ídnaðarøkinum á Oyrareingjum.

Grótið verður koyrt til Oyrareingir í tíðarskeiðinum umleið 05-03-2001 til 01-11-2001.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Landsbyggifelagið í seinasta lagi fríggjadagin tann 16. í hesum mánaðinum.

Tilboð í afturlætnum brævbjálva merktur "Grót á Oyrareingjum" skulu vera Landsbyggifelagnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. februar 2001 kl. 1400.

Lisitatiónin verður á skrivstovu okkara 21. februar kl. 14.00.

**Landsbyggifelagið P/f**
Grønlandsvegur 5
Postboks 228
FO-110 Tórshavn

**Oljumálastýrið**

## Journalførari til Oljumálastýrið

Í sambandi við barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir avloysara fyri journalførara í Oljumálastýrium. Starvið verður at seta 15. mars 2001 og er tíðaravmarkað til 1. apríl 2002.

Arbeiðið fevnir um journalisering í Doculive journalskipanini umframt at taka lut í dagliga arbeiðinum í Oljumálastýrinum eitt nú at avloysa í bókhaldinum og í móttøkuni.

Fyrimun hava tey, ið hava royndir og áhuga fyri journalisering og bókhaldi, umframt at duga væl føroyskt og enskt í skrift og talu.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum lønardeildina hjá Fíggjarmálastýrinum og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Tinu Johannesen, Oljumálstýrið, telefon 357070, telefax 357075 og teldupost tinaj@oms.fo

Umsóknir, saman við avriti av prógvi og frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Oljumálastýrinum, Postboks 3059, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. februar 2001.

## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

Sosialurin -tað loysir seg

## Ogn í Sandágerði til sølu



Vegna Føroya Skiftirætt verður sethúsaognin matr. nr. 984 a, Tórshavn, Dr. Dahlsgøta 15 við hesum lýst til sølu.

Gundøkið er sambært tingblaðnum 2.401 $m^2$ til víddar.

Á ognini, sum liggur í sera náttúrvøkrum umhvørvi við serstakliga góðum útsýni eru bygd tvey sethús.

Sethúsini eru til víddar ávikavist 2 x 135 $m^2$ og 50 $m^2$.

Boð undir kr. 2.2 mill. hava ongan áhuga.

Húsini verða víst fram eftir avtalu við Advokatvirkið.

Skrivlig boð skulu vera Advokatvirkinum í hendi í seinasta lagi **01.03.01**.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Advokatvirkið**
Páll Nielsen, adv. Eyðhild Skaalum, adv.
Sigmund Poulsen, adv. Hans Trygvi Teirin, adv.
J.H. Schrøtersgøta 20 · Postsmoga 85
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71 · Fax 31 58 74
e-mail: advokat@post.olivant.fo

## Sethús í Sandvík til sølu

Um nóg høgt boð fæst, eru eini eldri hús í Sandvík til sølu.

Áhugað skrivið til:
Sosialurin,
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 09.02.

## Toska- og hýsukvota til sølu

Av samlaðu kvotuni hjá M/TR »Boðasteini« á innaru fiskidagaleið eru 38 tons av toski og 48 tons av hýsu til sølu. Neyðugt er ikki at keypa alt undir einum. Loyvi at fiska kvotuna gongur út 28/2-2001.

**P/F Boðasteinur,**
tlf. 444800